# Tíma ikki at fara til Havnar á fund longur

*–Nú taka vit tað, sum tað kemur og so taka vit avleiðingarnar aftaná, sigur Jósup Henriksen, formaður í felagnum hjá lemmatrolarunum*



*–Teir, sum eiga lemmatrolararnar hava givið upp. Eingin lurtar eftir okkum. So nú lata vit bara standa til. Og tá ið avgerðin er fallin, taka vit avleiðingarnar, sigur Jósup Henriksen*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Hetta tíma vit ikki longur.

– Nú eru vit samdir um, at vit bíða bara eftir úrslitinum. Og so taka vit avleiðingarnar aftaná.

Tað er Jósup Henriksen í Sørvági, sum ikki tímir meiri.

Og tað, hann ikki tímir meiri, er fara til Havnar á fund í tíð og úrtíð.

Jósup Henriksen er formaður í felagnum hjá lemmatrolarunum.

Og júst hesin skipabólkurin hevur verið rættiliga umstríddur í longri tíð.

Teir eru ikki uppi í fiskidagaskipanini, tí teir fiska mest á djúpum vatni.

Men fiskivinnuumsitingin hevur í fleiri ár viljað havt teir upp í skipanina fyri at eisini teir kunnu laga seg til fiskiríkidømið undir Føroyum, sum tað eitur.

Og seinasta útspælið er, at teir smærru lemmatrolararnir skulu fáa 100 dagar á innaru leiðunum og teir størru trolararnir skulu fáa 80 dagar. Men hvør dagur skal kunna býtast við fýra dagar á ytru leiðunum.

Hetta uppskotið varð lagt fyri løgtingið á Ólavsøku og er nú til viðgerðar í vinnunevndini.

Teir, sum vara av lemmatrolarunum halda, at hetta eru alt ov fáir dagar.

Ikki minst vísa teir á, at teir eru langt úti og kunnu tí ikki sigla inn, hvørja ferð tað er óveður. Tí koma teir at brúka fiskidagar, hóast teir liggja bakk.

Teir føra eisini fram, at fiskiskapurin er so háttaður, at teir eru bæði á ytru og á innaru leiðum sama dag, tí soleiðis ferðast fiskurin.

### Vendst ikki aftur

Nú spurningin um at fáa lemmatrolararnir uppí fiskidagaskipanina er til viðgerðar, vóru umboð fyri felagið hjá trolarunum boðin á fund við vinnunevndina hjá løgtinginum.

–Har fingu vit at vita, at málið er helst komið so langt, at nú vendist ikki aftur, sigur Jósup Henriksen.

Hann sigur, at sjálvir førdu teir fram, at teir vildu helst vera undir skipanini sum er, í hvussu so er í fýra ár afturat, inntil 10 ára loyviskeiðið er runnið.

### Føla seg lumpaðar

Tað skilst eisini á Jósup Henriksen, at teir kenna seg ikki sørt lumpaðar av landsstýrinum.

– Tá ið dagaskipanin kom, vórðu lemmatrolararnir roknaðir út til at fáa 275 dagar í part.

–Men vit fingu ongantíð hesi tølini at vita. Ikki fyrrenn nú hava vit frætt um hesar útrokningarnar.

–Jósup Henriksen sigur, at helst vórðu tølini hildin loynilig fyri at fáa skipanina at ganga upp, tí fingu lemmatrolararnir sínar 275 dagar, hevði tað blivið ov lítið til onkran annan.

– Ístaðin fingu eitt hjáveiðiprosent uppá 4% av toski og hýsu.

–Tað er eitt prosenttal, sum er so lágt, at tað kann hvørki brúkast til eitt ella annað.

Jósup Henriksen vísir á, at øll onnur lond hava eitt hjáveiðiprosent upp á 10-12% og sjálvir lótu vit norðmenn hava eitt hjáveiðiprosent upp á 35%.

– Tá ið vit sípani mistu íløgustuðulin fingu vit eina hjáveiðikvotu uppá 100 tons av toski og 100 tons av hýsu um hálvárið, men tað var beinanvegin minkað 50%, niður í 50 tons.

–Tað, sum hendir nú, er so, at vit skulu kroystast upp í fiskidagakipanina - við alt ov fáum døgum.

### Fundast ikki meiri

Jósup Henriksen sigur, at tað er ein farri av vónloysi, sum nú eyðkennir teir, sum vara av lemmatrolarunum.

Hann sigur, at undir øllum umstøðum er tað liðugt við at ganga og renna til Havnar í tíð og úrtíð á fundir.

–Tað hava vit gjørt nú í fleiri ár, men tað er til onga nyttu, tí ongin lurtar eftir okkum.

– Vit eru komnir til ta niðurstøðu, at nú lata vit bara standa til. Nú má løgtingið um, hvat tað ger.

– Og tá ið avgerðin er fallin, fara vit at taka avleiðingarnar av tí.

– Tá fer hvør lemmatrolari at gera støðuna upp.

– Og tann, sum kemur til ta niðurstøðu, at tað ikki ber tilat halda fram, hann gevst so, sigur formaðurin í lemmatrolarafelagnum.

# Viðger trupulleikan við seyðaskinnunum

*Nú nærkast slaktið aftur. Men skinnini eru blivin ein umhvørvistrupulleiki. Nú hevur landsstýrið tikið málið upp*



*Tað fer nógv orka til at brenna seyðaskinn og í fjør var slaktið ein stórur trupulleiki hjá brennistøðunum. Nú er slaktið aftur í nánd, men nú arbeiðir Landsstýrið fyri at finna eina loysn á trupulleikanum við skinnunum*

ÁKI BERTHOLDSEN

Einaferð var ull Føroya gull.

Men tað eru seyðaskinnini ikki.

Tvørturímóti hava skinnini verið ein stórur trupulleiki seinastu árini.

Fyrr kundu skinnini seljast, men tað kunnu tey ikki meiri.

Í fjør blivu tískil øll skinnini brend á brennistøðunum.

Føroyingar fletta upp ímóti 50.000 seyðir um árið.

Sum kunnugt er tað eitt skinn upp á seyðin.

Og 50.000 skinn elvdu til trupulleikar á brennistøðunum í fjør, tí tað er dýrt at beina fyri so nógvum skinnum og tað skal nógv orka til at brenna tey-orka, sum kundi verðið brúkt til at brent okkurt annað.

Tað má heldur ikki koma fyri, at skinnini verða blakað í náttúruni, so at tey liggja har og sløðast.

Men nú ætlar landsstýrið at taka hendan trupulleika upp fyri at vita, um tað ikki finst ein ella onnur loysn.

Spurningurin varð umrøddur á landsstýrisfundi mánadagin og tað er gjørt av at arbeiða víðari við honum.

Málið verður mett sum eitt umhvørvismál, og tí er tað Eyðun Elttør, landsstýrismaður, sum skal gera eitt uppskot um, hvussu hesin trupulleikin kann loysast.

Landsstýrismaðurin sigur, at enn veit hann ikki, hvussu tey skulu grípa tað ann.

Men at málið ikki verður mett sum eitt vinnumál, kundi bent á, at tey, sum fletta, skulu ikki vænta sær nakran serligan prís fyri skinnini.

Tað er ongin marknaður fyri seyðaskinnum.

Og Eyðun Elttør sigur, at ætlanin er ikki at lata studning fyri at tey, sum hava seyð, skulu sleppa av við skinnini.

–Vit halda ikki, at tað er rætt at gera seyðaskinn til eina studningsvinnu, sigur hann.

Hann sigur, at tað eru annars fleiri hugskot um, hvat kann gerast, fyri ikki at koma í somu støðu, sum í fjør.

– Eitt hugskot er, at IRF skipat fyri innsavningarstøðum kring landið, har fólk kunnu lata skinnini.

– Síðani átekur IRF sær at beina skinnini burtur á skilagóðan hátt.

– Ein onnur loysn kundi verið at IRF savnaði skinnini saman og kanska saltaði tey og fekk eitt sindur fyri at føra tey út av landinum, so at útreiðsla ikki stóðst av tí, um tað so ongin vinningurin varð.

–Men annars eru onnur hugskot, sum landsstýrismaðurin nú fer at arbeiða víðari við.

Annars sigur Eyðun Elttør, at hava fólk góð hugskot um, hvat kann gerast, eru tey vælkomin at gera vart við seg.



# – Eg havi ikki verið ótrúgvur

*Fólkafloksmaðurin Bjarni Djurholm sigur seg ikki hava fríggjað til nakran, men hann viðgongur, at hann roknaði við, at onkur í andstøðuni fór at taka undir við hansara ætlanum*



*Løgtingsmaðurin hjá Fólkaflokkinum, Bjarni Djurholm, er endavendur í fjølmiðlunum seinastu tíðina, tí hann í viðmerkingum sínum til løgmansrøðuna gloppaði eina hurð til andstøðuna*

DIA MIDJORD

– Tá eg skrivaði viðmerkingarnar til løgmansrøðuna, dugdi eg sjálvur at síggja, at tað meir enn so kundi misskiljast.

Hetta sigur fólkafloksmaðurin Bjarni Djurholm, ið seinastu tíðina hevur verið heitasta evnið í føroyskum politikki.

Og orsøkin er einføld. Hann er løgtingslimur fyri Fólkaflokkin og biður samgonguna, har sami flokkur eigur løgmann, broyta taktikk í komandi fullveldissamráðingum við danir.

– Tað nyttar ikki at koma heim á fjórða sinni sum av torvheiðum. Tí mugu landsstýrið og samgongan taka í egnan barm, og krita vøllin upp av nýggjum, sigur fólkafloksmaðurin.

### Eskjan skal ristast

Bjarni Djurholm heldur, at til komandi samráðingar skuldi landsstýrið raðfest tey ymsu málini øðrvísi.

– Sjálvandi skal landsstýrið fara við somu krøvum, men eg haldi ikki, at fullur suverenitetur skal liggja ovast í eskjuni. Hetta kundi komið eitt sindur longri niðri í eskjuni, sigur Bjarni Djurholm.

Hann sigur víðari, at ein fýra ára skiftistíð tekur búskaparliga grundarlagið undan føroyska samfelagnum.

– Nógv hevur verið tosað um rationaliseringar og annað, men vit hava júst sama búskap í dag, sum vit høvdu fyri tveimum og fýra árum síðani. Tískil verður torført at taka undir við ultimativa útspælinum frá dønum, sigur Bjarni.

### Sáttmáli er loysnin

Fólkafloksmaðurin er sannførdur um, at ein altjóða góðkendur sáttmáli millum Føroyar og Danmark hevði hóskað sera væl at ligið ovast í eskjuni.

Hesin skal eitt nú áseta, at okkara stjórnarvald skal kunna yvirtaka øll málsøki og eisini hava fult ræði á øllum yvirtiknum økjum.

– Skiftistíðin verður so alt eftir, hvørji málsøki vit yvirtaka og hvussu nógv vit gjalda fyri tey, sigur Bjarni Djurholm og leggur aftrat, at hetta við tíðini styrkir okkara møguleikar at fáa fullkomnan suverenitet.

– Tí so hvørt árini ganga, verða færri og færri pengar í felagsskapinum millum Føroyar og Danmark, sigur Bjarni Djurholm at enda

# – Bjarni fer skeivur

*Jóannes Eidesgaard heldur einastu gongdu leið verða, at nýtt upplegg verður gjørt. – Tað nyttar ikki bara at rista eskjuna, tí uppleggið er tað sama, og tað verður ikki góðtikið av dønum*

DIA MIDJORD

Formaðurin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard, er langt frá samdur við Bjarna Djurholm, tá hesin vísir til ein nýggjan taktikk í oktober, tá ríkissamráðingar aftur eru á skránni.

– Statsministarin hevur afturvíst uppskotinum at útseta ígildiskomuna av fullveldinum, og hetta uppskotið hjá Bjarna Djurholm er ein onnur formulering av tí sama, heldur Jóannes Eidesgaard.

– Danir góðtaka ikki, at ein ella onnur loysn verður parkerað eitt ávíst áramál. Verður samráðst um fullveldið, verður tað gjørt út frá teimum fortreytum, at føroyingar ynskja tað skjótast gjørligt.



*Tað er ikki nokk bara at raðfesta av nýggjum. Alt uppleggið má gerast av nýggjum, heldur Jóannes Eidesgaard*

### Deyðføtt konsept

Jóannes Eidesgaard er sannførdur um, at talan er um eitt taktiskt trekk frá Fólkaflokkinum. Flokkurin hevur sæð í eyguni, at samráðingarnar koma ikki víðari við sama konsepti.

– Teir eru taktikarar um ein háls. Teir hava innanhýsis í flokkinum viðgjørt alt hetta undan orðaskiftinum. Taktikkurin hevur óivað verið at gloppa ein hurð til andstøðuna, men samstundis sissa samgongufelagar, sigur Jóannes Eidesgaard, ið kortini ikki veit, hvat hetta útspælið skal brúkas til.

Formaðurin í Javnaðarflokkinum sigur víðari, at taktiska trekkið hjá Fólkaflokkinum kann fáa samgonguavleiðingar.

– Tjóðveldisflokkurin sigur seg sjálvan hava flutt seg so nógv, at nú verður ikki loráð meira. Men skal andstøðan upp í part, so er Tjóðveldisflokkurin noyddur at toyggja seg longur, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Líkist nógv

Hann sigur víðari, at viðmerkingarnar hjá Bjarna Djurholm til løgmansrøðuna, eru ein markant broyting av meiningunum hjá samgonguni. Og Helena Dam á Neystabø róði á sama borð í sjónvarpinum týskvøldið.

– At Føroya Løgting skal hava møguleikan at taka fullveldið, men at tað ikki skal gerast her og nú, tað er í tráð við hugsanina hjá Javnaðarflokkinum, sigur Jóannes Eidesgaard.


HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

| Verksmiðjumerki | km. | mán. | árg. | søluprísur |
|---|---|---|---|---|
| Toyota Camry STC 2.0 (AVHEINTINGAR-TILBOÐ) | 160.000 | Aug. | 1987 | 10.000,- |
| Citroën ZX 1.9 TD | 90.000 | | | 104.900,- |
| Suzuki Baleno Van | 35.000 | Aug. | 1997 | 75.000,- (Við MVG) |
| Ford Escort Diesel | 86.000 | Aug. | 1996 | 103.500,- |
| Citroën BX 1.9 Diesel (NÝ SÝNAÐUR) | 185.000 | Aug. | 1991 | 59.000,- |
| Opel Astra 1.6 GLS (NÝ SÝNAÐUR) | | Sept. | 1995 | 99.900,- |
| Citroën ZX 1.9 TD | 99.000 | Apr. | 1997 | 109.000,- |
| Citroën Xantia 1.8i 5H | 45.000 | Apr. | 1995 | 110.000,- (Við MVG) |
| Citroën Xantia 3.0 V6 (BRÚKTBILA GARANTI) | 34.500 | Juni | 1998 | 180.000,- |
| BMW 320i (AVHEINTINGAR-TILBOÐ) (NÝ SÝNAÐUR) | 216.300 | Mai | 1987 | 19.900,- |
| Mazda 323 1.5 Sedan (BRÚKTBILA GARANTI) | 2.500 | Mars | 2000 | 142.000,- |
| Mitsubishi Lancer Diesel | 189.000 | Juli | 1990 | 19.000,- |
| Fiat Scudo 1,9 TD | 130.000 | Mars | 1997 | 125.000,- (Við MVG) |

OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ!

AVHEINTINGAR-TILBOÐ
ISUZU PICK UP 4X4 DIESEL einans kr. 24.900,-

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Hoyvíksvegur 63 - FO-100 Tórshavn - Tel. 313666 - Fax 310866

Sosialurin - Tel. 311820